LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# ÁRSFRÁGREIÐING
# UM
# EFTIRKANNING

LØGTINGSÁRIÐ 2020

29. juli 2020 – 28. juli 2021

# LÓGARTÆNASTAN

## Formæli

Við gildi frá løgtingsárinum 2014 skulu øll uppskot frá landsfyrisitingini eftirkannast, áðrenn tey verða løgd fyri Løgtingið ella kunngjørd. Eftirkanningin fer fram eftir ásetingunum í rundskrivi um eftirkanning og rundskrivi um lógarsmíð.

Tað er lógartænastan á Løgmansskrivstovuni, sum hevur ábyrgdina av eftirkanningunum. Á lógartænastuni eru fimm starvsfólk, av hesum eru tríggir løgfrøðingar. Arbeiðið er skipað soleiðis, at øll eru við í eftirkanningararbeiðinum. Løgfrøðingarnir hava ábyrgd av tí løgfrøðiligu eftirkanningini, meðan hini bæði starvsfólkini hava ábyrgd av tøkniligu eftirkanningini.

Rundskriv um eftirkanning ásetir, at uppskot til løgtingslóg, ríkislógartilmæli, samtyktar, kunngerð, rundskriv, leiðbeining, bekendtgørelse, lovbekendtgørelse, og anordningsbekendtgørelse skulu eftirkannast. Tað er ásett, hvat eftirkanningin fevnir um, mannagongdir og tíðarfreistir í samband við innlating av uppskotum og eisini, hvat lógartænastan ikki eftirkannar.

Lógartænastan eftirkannar uppskot tøkniliga og løgfrøðiliga, men ikki málfrøðiliga. Umsitingin í Løgtinginum eftirkannar uppskot eisini málfrøðiliga. Tað er tí ábyrgdin hjá tí einstaka stjórnarráðnum at ansa eftir, at uppskot til lógir og kunngerðir eru málsliga lýtaleys.

Lógartænastan skal hava minst 5 yrkadagar at eftirkanna eitt uppskot. Hetta eiga stjórnarráðini at hava í huga, tá tey gera tíðarætlan fyri síni uppskot. Í hesum sambandi fara vit á minna á, at uppskotini skulu sendast til eftirkanningar, áðrenn tey verða send til politiskan landsstýrisfund, men aftan á at tey hava verið til ummælis.

Í løgtingsárinum 2020 eftirkannaði lógartænastan tilsamans 234 uppskot. Lógartænastan eftirkannaði 93% av uppskotunum innan 5 dagar, og 99% av uppskotunum vóru eftirkannað innan 8 dagar.

Hetta er sjeynda ársfrágreiðingin, sum verður givin út. Endamálið við útgávuni er framvegis at kunna stjórnarráðini um ymiskt viðvíkjandi lógarsmíði og at siga frá okkara royndum seinasta løgtingárið, og hvussu hetta eftirkanningarárið eftir okkara tykki hevur hepnast.

Eisini er ein partur um ummælistíðir hjá stjórnarráðunum, viðgerðina í Løgtinginum og yvirlit yvir rættarreglur, sum eru kunngjørdar í Kunngerðarblaðnum.

Løgmansskrivstovan, 8. februar 2022

**Nella Festirstein**
Deildarstjóri

**INNIHALDSYVIRLIT**

1. Løgfrøðiliga eftirkanningin ... 5
1.1. Ásetingar um løgfrøðiligu eftirkanningina ... 5
1.2. Covid-19 lóggáva ... 6
1.3. Gjald fyri kravdar covid-19 kanningar ... 6
1.4. Tíðaraavmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroyar ... 7
1.5. Markaforðingar. COVID-19 ... 7
1.6. Leingjan av avgjaldstíðarskeiði og sólseturáseting ... 7
1.7. Broyting í greinum sum enn ikki eru komnar í gildi ... 8
1.8. Atgongd til elektroniskar upplýsingar úr akfarsskránni. Skipan av gomlum heimildum ... 8
1.9. Myndugleikaheiti í lógum, sum hoyra undir samansett stjórnarráð ... 8
1.10. Hvat skal skrivast í kunngerð? ... 8
1.11. Sambandi millum sjálvstøðugan almennan grunn og landsstýrið ... 8
1.12. Nógvar broytingar í eldri lóggávu, so umhugsa at gera nýggja lóg. Gomul skjøl strikast ... 9
1.13. Almannakunngering ... 9
1.14. Broyting sum ávirkar eina heimildaráseting ... 9
1.15. Gamlar kunngerðir sum ikki vera skiftar út ... 9
1.16. Eftirlitið fingið til vega frá útlendskum, privatum ella almennum veitara ... 10
1.17. Ígildissetan av ES-reglum í løgtingslóg ... 10
1.18. Revsiáseting. Kunngerð um at innflyta hundar, kettur og gitnaðarevni ... 10
1.19. Avvarðandi landsstýrismaður ... 10
1.20. Greið og upplýsandi heiti ... 11
1.21. Koppseting við avlopsskamti ... 11
1.22. Gildiskoma ... 11
1.23. At vísa til broytingarlóg ... 11
1.24. Kunngerðin við tveimum heimildarlógum, har bara onnur er tíðaravmarkað ... 11
1.25. Fráboðan um arbeiðsskaða og vinnusjúkur gerast talgilt. Krøv til trygd ... 12
1.26. Val av óheftum nevndum o.tíl. ... 12
1.27. Armslongd ... 12
1.28. Lógaruppskot sum leggja ábyrgd á kommunurnar ... 12
1.29. Heimild at krevja stuðul sbrt. verklagslóg aftur, eftir at løgtingslógin er farin úr gildi ... 13
1.30. Vanligar málsviðgerðarreglur, innlitsreglur og reglur um persóndáta ... 13
1.31. At senda til ummælis ... 13
1.32. Ásetingar um eftirkanning av ríkislóggávu ... 14

2. Tøkniliga eftirkanningin ........ 16
2.1. Ásetingar um tøkniligu eftirkanningina ........ 16
2.2. Tá broytt verður í einum eftirkannaðum uppskoti ........ 16
2.3. Uppskot sum er burturfallið í tinginum og verður sett fram aftur ........ 16
2.4. Skabelónir ........ 16
3. Yvirlit yvir eftirkanningar ........ 18
3.1. Uppskot, ið skulu eftirkannast av lógartænastuni ........ 18
3.2. Yvirlit yvir uppskotini ........ 19
3.3. Hvat siga tølini? ........ 21
3.4. Longd á eftirkanning ........ 23
4. Eftirkannað uppskot og viðgerðin í Løgtinginum ........ 25
4.1. Løgmansskrivstovan ........ 25
4.2. Fíggjarmálaráðið ........ 25
4.3. Umhvørvis- og vinnumálaráðið ........ 26
4.4. Fiskimálaráðið ........ 26
4.5. Uttanríkis- og mentamálaráðið ........ 26
4.6. Almannamálaráðið ........ 26
4.7. Heilsumálaráðið ........ 26
5. Ummælisportalurin ........ 27
5.1. Einans uppskot sum eru løgd á ummælisportalin ........ 27
5.2. Ummælisfreistir ........ 28
5.3. Samanumtøka um ummælisfreistir ........ 29
5.4. Ov nógv uppskot verða ikki løgd á ummælisportalin ........ 29
6. Kunngerðarblaðið ........ 31
6.1. Kunngering í tingárinum 2020 ........ 31

# 1. Løgfrøðiliga eftirkanningin

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

3.1. Lógartænastan á Løgmansskrivstovuni eftirkannar øll lógaruppskot, uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Eftirkannað uppskot, ið eru fallin fyri freist Løgtingsins og verða løgd fram aftur, skulu eftirkannast aftur, um tey verða løgd fyri Løgtingið aftur. Frávik frá hesum kann einans gerast í samráð við løgmann.

3.2. Lógartænastan eftirkannar øll uppskot til kunngerðir, rundskriv og leiðbeiningar, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini øll uppskot til kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at kunngera kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna. Lógartænastan skal eisini eftirkanna uppskot til bekendtgørelse, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse, sum ríkismyndugleikarnir senda til ummælis hjá stjórnarráðunum.

Vit fara at taka fram nøkur av teimum evnum, ið vit hava sæð í eftirkanningini í hesum tingárinum.

Okkara royndir eru, at stjórnarráðini í stóran mun taka undir við viðmerkingunum, sum tey fáa til eftirkanningina. Um ráðið heldur, at okkurt er ógreitt, ella tey ikki eru samd við metingina hjá lógartænastuni, samskifta vit við ráðið um hetta, og sum oftast koma vit til eina felags fatan.

Í hesi ársfrágreiðingini taka vit einstøk evni upp, sum hava verið frammi í tingárinum, ella evni sum tað hevur verið spurt um, og slíkt sum vit framhaldandi halda eiga at gerast betur.

## 1.1. Ásetingar um løgfrøðiligu eftirkanningina

7.2. Løgtingslógir: Lógartænastan eftirkannar fyrst og fremst, um løgtingslógaruppskot er í samsvari við grundlóg, heimastýrislóg, stýrisskipanarlóg, tingskipan, tvørgangandi lógir, eitt nú evropeiska mannarættindasáttmálan EMRS, revsilóg, fyrisitingarlóg, løgtingslóg um alment innlit og løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, almennar rættargrundreglur og almenn rættarprinsipp.

7.3. Harumframt verður serliga hugt at heimildarásetingum til fyrisitingina, afturvirkandi virknað, pantireglum, fyrisitingarligum sektaruppskotum, heimild at áseta gjald, eftirlitsásetingum, afturtøka av løggilding, revsireglum, gildiskomureglum, skiftisreglum, kærureglum o.tíl.

7.4. Lógartænastan eftirkannar, at løgtingslógaruppskotið er greitt og skilligt fyri bæði løgtingsmenn og borgaran, at sundurbýti í lógargreinar, stykkir, kapitlar, yvirskriftir o.tíl. er hóskandi, og at bæði tær almennu og serligu viðmerkingarnar til uppskotið samsvara við sjálvan lógartekstin.

7.6. Kunngerðir: Formligu krøvini til kunngerðir eru sum ásett í rundskrivi um lógarsmíð. Lógartænastan kannar fyrst og fremst, um neyðug heimild má metast at vera fyri kunngerðini. Hvat viðvíkur innihaldinum í eftirkanningini annars verður víst til brotini um eftirkanning av løgtingslógaruppskotum.

## 1.2. Covid-19 lóggáva

Eisini í tingárinum 2020 var neyðugt við fleiri Covid-lógum og kunngerðum. Tilsamans vóru 14 løgtingslógir, 14 kunngerðir og 13 bekendtgørelser sett í gildi. Lóggávan fevnir um ymisk hjálparátøk og tillagingar orsakað av covid-smittuni. Talan er um lóggávu, sum er sett í gildi eitt avmarkað tíðarskeið. Tí hevur í nøkrum førum verður neyðugt at leingja um gildi á lóggávuni, og í øðrum førum at gera nýggja lóggávu, tá ið ein eldri lóggáva er farin úr gildi.

Lógartænastan hevur í hesum sambandi mælt til t.d. at seta tíðarskeiðið, sum ein kunngerð skuldi fevna um, inn í heitið. Hetta fyri at sleppa undan, at kunngerðin kom í bland við aðra kunngerð við sama heiti, og sum nú er søgulig, men sum ikki fer úr gildi, fyrrenn lógarheimildin fer úr gildi 1. februar 2021.

## 1.3. Gjald fyri kravdar covid-19 kanningar

Í lógaruppskotinum var ásett eitt gjald við komu til Føroyar. Gjaldið var grundað á útreiðslur landsins til kravdar Covid-19 kanningar. Ætlanin við uppskotinum var, at kanningar framdar millum 1. oktober til 31. desember skuldu rindast av ferðafólkum og ikki av landskassanum.

Málsøkið at forða fyri smittuspjaðing er felags málsøki, sum er skipað í Farsóttalógini, sum er anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme. Endamálið við farsóttalógini er at forða fyri smittuspjaðing í Føroyum av ávísum sjúkum, undir hesum COVID-19. Sambært farsóttalógini kann farsóttanevndin seta ávís smittufyribyrgjandi tiltøk í verk. Sambært § 28 í farsóttalógini skal landsstýrið gjalda fyri tær útreiðslur, sum standast av hesum tiltøkum.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið var greitt frá, at av tí at landsstýrið skal gjalda fyri tær útreiðslur, sum standast av tiltøkum, sum verða sett í verk sambært farsóttalógini, ber til at tulka, at tann fíggjarligi parturin av farsóttaøkinum er yvirtikin. Í øðrum lagi var hildið, at tað bar til at tulka, at gjaldsparturin varð yvirtikin við lógaruppskotinum.

Lógartænastan tók ikki undir við sjónarmiðinum hjá Fíggjarmálaráðnum, og helt ikki, at tann fíggjarligi parturin av farsóttaøkinum kundi sigast at verða yvirtikin. Lógartænastan helt, at tað var ivasamt, um tað ber til í eini løgtingslóg at hava ásetingar um gjald fyri kanningar fyri COVID-19. Ásetingar, sum lagt varð upp til, hoyra av røttum heima í farsóttalógini, sum er felags málsøki og undir málsræði hjá ríkismyndugleikunum. Lógartænastan helt harumframt, at tað var óheppið, at man einsíðugt frá føroyskari síðu tulkar ríkislóggávu soleiðis, at málsøki er yvirtikið. Hetta eigur at verða umrøtt millum partarnar, soleiðis at ein felags fatan fæst av málsøkjabýtinum.

Um landsstýrið ynskir at yvirtaka málsøkið – antin tann fíggjarliga partin av farsóttaøkinum ella farsóttaøkið sum heild – mælti lógartænastan til, at vanligu mannagongdirnar verða fylgdar, og at uppskot um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum verður lagt fyri Løgtingið. Farsóttaøkið kann yvirtakast uttan tingingar við danir, og kann tí gerast rættiliga ómakaleyst. Hetta hevði eisini gjørt tað lættari hjá landsstýrinum seinni at áseta aðrar reglur um fyribyrging av smittuspjaðing, um hetta skuldi verið neyðugt.

Um Fíggjarmálaráðið helt fast um tulkingina av yvirtøkuspurninginum í viðmerkingunum til uppskotið og tí helt fast við, at uppskotið skuldi leggjast fyri Løgtingið í verandi líki, vísti lógartænastan á, at tað av røttum átti at vera Heilsumálaráðið – og ikki Fíggjarmálaráðið – sum legði uppskotið fyri Løgtingið.

Sambært § 20, nr. 22 í fráboðan nr. 128 frá 16. september 2019 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar við seinni broytingum hevur landsstýrismaðurin í heilsumálum fyrisitingarheimildir, sum eru hjá landsstýrinum eftir farsóttalógini.

Landsstýrismaðurin í Fíggjarmálum hevur m.a. ábyrgd av málsøkjunum skattir og avgjøld. Uppskotið, sum Fíggjarmálaráðið hevði sent til eftirkanningar, innihelt tó ikki reglur um skatt ella avgjøld. Lagt varð upp til eitt tænastugjald fyri eina (heilsufrøðiliga) kanning, sum er áløgd av farsóttanevndini sambært farsóttalógini. Lógartænastan metti, at hetta av røttum hoyrdi heima hjá landsstýrismanninum í heilsumálum. Tað var í hesum sambandi m.a. víst á, at tað var Heilsumálaráðið, sum hevði gjørt avtalur við privatu fyritøkurnar, sum gera kanningar fyri korona á flogvøllinum og í Hirtshals, og at tað tí illa bar til hjá landsstýrismanninum í Fíggjarmálum at áseta í kunngerð, hvat kanningin kostar. Fíggjarmálaráðið tók viðmerkingarnar hjá lógartænastuni til eftirtektar, og uppskotið til løgtingslóg um gjald fyri kravdar kanningar varð ikki lagt fyri Løgtingið.

### 1.4. Tíðaraavmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroyar

Við uppskotinum verður álagt eitt avgjald á kr. 312,00 fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2020 til 31. desember 2020. Broytingin er grundað á øktu útreiðslurnar til Covid-19-kanningar. Endamálið við uppskotinum er at áleggja eitt tíðaravmarkað avgjald, sum er grundað á øktu útreiðslurnar hjá landskassanum til Covid-19-kanningar.

Lógartænastan viðmerkti, at uppskotið er ógvuliga stuttorðað, og at tað er ógreitt, hvørja skipan Fíggjarmálaráðið leggur upp til, og hvussu henda skipan skuldi virka í praksis. Tað átti at framganga greiðari av bæði lógarteksti og viðmerkingunum, hvussu skipanin var hugsað, og tað átti eisini at verða greitt nærri frá í viðmerkingunum, hvussu hon í praksis skal fungera.

### 1.5. Markaforðingar. COVID-19

Uppskotið gav landsstýrismanninum heimildir til at gera broytingar innan próvtøkur í gymnasialum miðnámi til tess at mótvirka avleiðingar, sum tiltøk í sambandi við COVID-19 hava havt og kunnu hava fyri næmingarnar í sambandi við próvtøkur og víðari lesna. Lógartænastan spurdi í samband við eftirkanningina, um kann tað skapa forðingar fyri næmingar at brúka sítt prógv til víðari lestur uttanlands, at tað verður vikið frá vanligu reglunum um próvtøku?

### 1.6. Leingjan av avgjaldstíðarskeiði og sólseturáseting

Í høvuðslógini var ásett, at áðrenn ella við komu til Føroya skulu ferðandi, sum eru 12 ár ella eldri, í tíðarskeiðnum 1. oktober 2020 til og við 31. desember 2020 rinda eitt avgjald á kr. 312,00. Høvuðslógin hevði onga sólsetursáseting. Í broytingaruppskotinum skuldi avgjaldstíðarskeiðið leingjast til 31. mars, og í broytingarlógini var skotið upp at hava eina sólseturáseting um, at broytingarlógin fór úr gildi 1. apríl 2021.

Lógartænastan segði, at tað er ongin meining í at hava sólsetursáseting í broytingarlógini. Um sólseturáseting skal setast í lógina, eigur tað at vera sett inn í gildiskomuásetingina í høvuðslógini. Men um ætlanin er at leingja tíðarskeiðið aftur aftan á 31. mars, skal man tá ansa eftir, at hetta verður gjørt, áðrenn (høvuðs-)lógin fer úr gildi. Mælt varð frá at hava sólsetursáseting í broytingarlógini ella í høvuðslógini. Mælt verður til at hava vanliga gildiskomuáseting.

**1.7. Broyting í greinum sum enn ikki eru komnar í gildi**

Broyting var gjørd í greinum, sum enn ikki vóru komnar í gildi. Tær broytingarnar skuldu koma í gildi, samstundis sum nýggju broytingarnar í hesum lógaruppskotinum skuldu koma í gildi. Lógartænastan viðmerkti, at í slíkum førum eiga broytingarnar í lógaruppskotinum at orðast sum um fyrru broytingarnar longu vóru komnar í gildi. Broytingar sum koma í gilda sama dag, koma í gildi í tíðarrøð, tær eldru fyrst og tær nýggjastu seinast.

**1.8. Atgongd til elektroniskar upplýsingar úr akfarsskránni. Skipan av gomlum heimildum**

Heimilað var í Ferðslulógini, at elektroniskar upplýsingar úr akfarsskránni hjá Akstovuni kunnu latast almennum eftirlitsmyndugleikum, har m.a. tunnilsfeløgini, høvdu hesa heimild í serligari løgtingslóg. Mælt varð til, at úrgildisseting av ásetingunum í hesum serlógunum varð gjørd sum sjálvstøðug lógarbroyting í viðkomandi løgtingslógum, og at landsstýrismaðurin fekk heimild til í kunngerð at áseta, nær broytingarnar koma í gildi.

**1.9. Myndugleikaheiti í lógum, sum hoyra undir samansett stjórnarráð**

Í kunngerð um gymnasialt útbúgvingarráð varð mælt til heldur at skriva: Mentamálaráðið. Hóast Mentamálaráðið í dag er saman við Uttanríkisráðnum, er hetta framvegis ein uppgáva, sum liggur á málsøkinum hjá Mentamálaráðnum. Talan er um tvey sjálvstøðug málsøki, sum ikki eru integrerað ella natúrliga hoyra saman, og tí er hugsandi, at hesi bæði stjórnarráð ikki altíð fara at vera saman.

**1.10. Hvat skal skrivast í kunngerð?**

Serliga óroyndir fulltrúar kunnu ivast í, hvat tað er fyri "nærri ásetingar", sum landsstýrismaðurin skal gera í kunngerð. Her eru ráðini at lesa viðmerkingarnar til heimildarlógina fyri at síggja, hvat ætlandi skal ásetast í kunngerð. Hetta skal samstundis vera ein áminning til tey, sum skriva lógaruppskotini, um at gera sær ómak við at lýsa, hvat tað er, ið eftir ætlan skal ásetast nærri í kunngerð.

**1.11. Sambandi millum sjálvstøðugan almennan grunn og landsstýrið**

Broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunnin. Tá ið talan var um ein sjálvstøðugan grunn, hvørs ovasta leiðsla er eitt stýri, varð tað hildið at vera ivasamt, um tað er í samsvar við galdandi skipan, at landsstýrismaðurin skal góðkenna ítøkiligar verkætlanir hjá grunninum. Í galdandi løgtingslóg skipar landsstýrismaðurin virksemið hjá Húsalánsgrunninum við áseting í kunngerð, og landsstýrismaðurin hevur eisini eftirlit við Húsalánsgrunninum.

Hóast tað ikki er vanligt, at ein almennur grunnur, ið kann sammetast við ein almennan stovn, fær heimild at stovna partafelag, varð hildið, at tað sum so ikki er nakað, sum forðar fyri, at Húsalánsgrunnurin stovnar partafelag einsamallur ella saman við øðrum. Hinvegin varð hildið, at tað er ivasamt og neyvan í samsvar við skipanina, tá ið talan er um ein sjálvstøðugan grunn, at landsstýrismaðurin í hvørjum einstøkum føri skal góðkenna, at Húsalánsgrunnurin stovnar partafelag. Hetta tykist at vera ein uppíblanding í virksemið hjá Húsalánsgrunninum, sum ikki sampakkar við, at landsstýrismaðurin eisini hevur eftirlit við grunninum. Mælt varð til, at landsstýrismaðurin heldur enn við góðkenning í ítøkiligum førum ger sína ávirkan á virksemið hjá Húsalánsgrunninum galdandi við áseting í kunngerðum.

### 1.12. Nógvar broytingar í eldri lóggávu, so umhugsa at gera nýggja lóg. Gomul skjøl strikast

Tá ið tað verða gjørdar nógvar broytingar í eini lóg, eigur tað at verða umhugsað heldur at gera eina nýggja lóg. Vandin fyri, at feilir koma í, er størri, tá ið nógvar og smáar broytingar verða gjørdar.

### 1.13. Almannakunngering

Eltrygdarlógin. Ásetingin snúði seg um almannakunngering av umsókn um ognartøku av fastari ogn til at leggja undir ella oman á jørð leiðingar við mastrum, transformarastøðum o.t., ið hoyra til, tá ið útbúnaðurin er ætlaður til býti av elmegi til spenningar niðan fyri 72kV. Elnevndin skal kunngera 2 reisir, at umsókn um ognartøku er fingin og við tilskilan av innihaldinum í umsóknini, og hvørji rættindi ynskt verður at fáa. Í uppskotinum varð skotið upp, at almannakunngeringin skuldi gerast í landsumfatandi almennum blað ella bløðum. Lógartænastan mælti til at umhugsa at hava heimild at kunngera á øðrum miðlum, t.d. elektroniskum.

### 1.14. Broyting sum ávirkar eina heimildaráseting

Tá ið broyting verður gjørd í eini grein eigur at verða ansa eftir, um broytingin verður gjørd í eini heimildaráseting, og um kunngerðir er givnar út við heimild í greinini. Um so er má fylgibroyting gerast í innganginum hjá útgivnu kunngerðunum, sum rættar heimildartilvísingina. Tað sama er galdandi um t.d. ein heimildaráseting skiftir pláss í greinini, tí at nýtt stykki verður sett inn í greinina frammanfyri heimildarásetingina.

### 1.15. Gamlar kunngerðir sum ikki vera skiftar út

Tá ið nýggj høvuðslóg verður gjørd t.d. løgtingslóg um almannatrygd og tænastur ella Sjófeingislóg er vanligt, at galdandi kunngerðir verða verandi í gildi, hóast heimildarlógin verður sett úr gildi. Orðingin er kann vera: “Kunngerðir við heimild í lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg hava framvegis gildi í tann mun, tær ikki eru í ósamsvari við ásetingarnar í hesi løgtingslóg” ella “Kunngerðir við heimild í løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi hava framvegis gildi í tann mun, tær ikki eru í ósamsvari við ásetingarnar í hesi løgtingslóg. Kunngerðir fara úr gildi sambært ásetingum um gildistíð í hesum kunngerðum ella við kunngerðum, sum koma í staðin fyri verandi kunngerðir.”

Trupulleikin er at ofta verða nýggjar kunngerðir ikki gjørdar, og tær gomlu kunngerðirnar verða hangandi í fleiri ár. Hetta er ikki endamálið við slíkum skiftisásetingum, ið eru ælaðar at geva stjórnarráðnum tíð at gera nýggar kunngerðir t.d. innan eitt ár ella so. Hetta er óheppið, tí tað gruggar rættarstøðuna, at nýggjar kunngerðir ikki verða gjørdar við heimild í nýggju lógini.

**1.16. Eftirlitið fingið til vega frá útlendskum, privatum ella almennum veitara**
Kunngerðin ásetti, at landsstýrismaðurin skipaði fyri óheftum, námsfrøðiligum eftirliti í minsta lagi annað hvørt ár. Eisini var ásett, at landsstýrismaðurin kundi um neyðugt skipa soleiðis fyri, at eftirlitið varð fingið til vega frá útlendskum, privatum ella almennum veitara. Lógartænastan spurdi, um heimild var fyri hesum í heimildarlógini. Tað sást tó í viðmerkingunum til løgtingslógina, at landsstýrismaðurin var ikki avmarkaður í mun til, hvussu eftirlitið varð skipað, undir hesum námsfrøðiliga eftirlitið, og at landsstýrismaðurin um neyðugt kundi skipa soleiðis fyri, at eftirlitið varð fingið til vega frá útlendskum, privatum ella almennum veitara.

**1.17. Ígildissetan av ES-reglum í løgtingslóg**
Hetta var fyrsta løgtingslógin eftir leistinum sambært parti 5 í rundskriv um lógarsmíð, um at seta inn ES-reglur í løgtingslóg. Lógartænastan mælti til, at tá ið ES-reglur verða settar inn í løgtingslóg, er best at hava eitt føroyskt heiti: T.d. Løgtingslóg um serligar treytir fyri lógarásettari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga. Eisini varð mælt til at umhugsa at geva løgtingslógini eitt stytt heiti, sum er lættari at brúka til gerandis. T.d. (PIE-fyriskipanin). Sí rundskriv um lógarsmíð nr. 1.3.4. Eisini varð víst á, at tá ið víst verður til ES reglur, verður bara nr. og árstal skrivað – ikki dagfesting. Dagfestingin verður skrivað í viðmerkingarnar til lógaruppskotið.

**1.18. Revsiáseting. Kunngerð um at innflyta hundar, kettur og gitnaðarevni**
Djóravælferðarlógin hevur ásetingar um, hvussu djór skulu flytast. Flutningsfeløg, sum flyta djór, skulu lúka hesar treytir, og so var spurningurin, um brot á ásetingar í kunngerðini um at innflyta hundar, kettur og gitnaðarevni skulu revsast. Djóraflutningur skal altíð fara fram eftir reglunum í kunngerð um vernd av djórum undir flutningi, og har er tað revsiálagt, men skal tað eisini gerast í hesi kunngerðini?

Lógartænastan staðfesti, at kunngerð um vernd av djórum undir flutningi er galdandi eisini fyri kettur og hundar. Út frá tí kundi mann siga, at tað var óneyðugt at endurtaka tað í hesi kunngerð, um tað ikki er okkurt meira, sum varð álagt flutningsfeløgunum eftir kunngerðini um kettur og hundar, og sum tí ikki kann revsast eftir tí kunngerðini. Lógartænastan helt, at um UVMR ikki vildi avmarka revsingina til sekt fyri brot á kunngerðina um kettur og hundar, átti tað at verið ásett í hesi kunngerðini. Tað var framvegis møguleiki fyri hægri revsing við ásetingini í § 57, stk. 1 í uppskotinum.

**1.19. Avvarðandi landsstýrismaður**
Tað er ikki neyðugt at skriva málsøkið í løgtingslógina. Tað fylgir av málsbýtisfráboðanini hjá løgmanni.

**1.20. Greið og upplýsandi heiti**
Lógartænastan mælti til at brúka fylgjandi heitið: "Løgtingslóg um at binda saman H og B bygningarnar á Landssjúkrahúsinum og keyp av neyðstreymsverki, tólum og útgerð" í staðin fyri uppskot til løgtingslóg um at umbyggja og byggja á Landssjúkrahúsinum, sum er minni frágreiðandi.

Tað er yvirhøvur týdningarmikið, at heiti ikki verða ov generelt orðað, tí tað kann viðhvørt eisini vera beinleiðis misvísandi. Yvirhøvur er verri hjá borgaranum at finna viðkomandi lógir og kunngerðir, tá ið heitið er ov generelt, og øki verður harvið minni gjøgnumskygt.

**1.21. Koppseting við avlopsskamti**
Í kunngerðini var ásett at um so er, at skamtur loypur av tann dag koppsett verður, kann Sjúkrahúsverkið koppseta onnur enn tey í stk. 1 nevndu. Mælt verður til gjølla at umhugsa, um tað er skilagott at seta hesa heimildina inn. Henda heimild gevur sjúkrahúsverkinum loyvi til frítt at avgera, hvør kann koppsetast við avlopsskamtinum. Koppsetingar eiga at kunnu skipast soleiðis, at um talan er um avlopsskamt, er tað tey í bólkum, sum um tað mundið eru raðfestir fremst, sum verða koppsett eisini við avlopsskamti. Um tit vilja varðveita heimildina, má hon meira neyvt áseta, hvør kann koppsetast við avlopsskamti og undir hvørjum umstøðum.

**1.22. Gildiskoma**
Tað stóð í eini áseting í broytingarkunngerð, at hon kom í gildi, "tá kunngerðin fær gildi". Lógartænastan spurdi, hvussu hetta skuldi skiljast? Er tað tá broytingarkunngerðin ella tá upprunakunngerðin frá 2017 varð sett í gildi? Soleiðis sum tað var orðað, helt lógartænastan, at tað varð víst til, tá upprunakunngerðin komi í gildi, tvs. í 2017. Spurt var, um tað var ætlanin. Um ikki er betri at seta eina dagfesting inn í staðin, t.d. 1. apríl 2021.

**1.23. At vísa til broytingarlóg**
Nr. og dagfesting verður vanliga ikki skrivað, tá ið víst verður til aðra lóg. Sí rundskriv um lógarsmíð nr. 1.1.7. Í hesum førinum var nr. og dagfesting sett inn, tí tað vóru tvær broytingarlógir við sama heiti. Av tí, at lógirnar høvdu ymisk frágreiðandi heiti, mælti lógartænastan í hesum føri til at seta frágreiðandi heitið inn í staðin fyri nr. og dagfesting, so tað sæst, hvørja broytingarlóg víst verður til. Nr og dagfesting verður skrivað í viðmerkingarnar til løgtingslógina.

**1.24. Kunngerðin við tveimum heimildarlógum, har bara onnur er tíðaravmarkað**
Kunngerðin hevði tvær heimildarlógir, har bara onnur er tíðaravmarkað. Kunngerðin fellur tí ikki burtur av sær sjálvari 1. oktober 2021, tá tann eina heimildarlógin fer úr gildi. Hin heimildarlógin er tá framhaldandi í gildi. Lógartænastan mælti til at umhugsa, um kunngerðin skuldi setast at fara úr gildi 1. oktober 2021.

**1.25. Fráboðan um arbeiðsskaða og vinnusjúkur gerast talgilt. Krøv til trygd**
Ásett var, at fráboðanir um arbeiðsskaðar og vinnusjúkur skulu gerast talgilt. Slíkar fráboðanir um arbeiðsskaðar og vinnusjúkur mugu metast at fevna um viðkvæmar upplýsingar, sum seta størri krøv til trygdina. Spurningurin var, um almenna talgilda samskiftisskipanin var trygg nokk, tí talgilt samskifti er ikki tað sama sum trygt samskifti, har tað krevst, at samskifti er bronglað. Lógartænastan helt, at tað átti at staðið í heimildini, at trygt samskifti skal nýtast. Eisini varð mælt til at at umhugsa, um tað í ávísum førum skal kunna gevast undantaksloyvi frá kravinum um talgilt samskifti. Hetta kundi t.d. verið grundað á heilsulig viðurskifti, sum eru serliga viðkomandi í hesum førinum.

**1.26. Val av óheftum nevndum o.tíl.**
Landsbankin er óheftur almennur myndugleiki. Ásett var í lógaruppskoti, at talið av nevndarlimum skuldi minkað úr 7 niður í 3 limir. Sambært galdandi lóg vóru 2 limir tilnevndir beinleiðis av landsstýrismanninum, meðan hinir limirnir vóru tilnevndir eftir tilmæli frá ávikavist Fróðskaparsetri Føroya, arbeiðsgevarafelagnum, fakfeløgunum og kommunufelagnum. Nevndin var saman við stjóranum ovasti myndugleiki hjá Landsbankanum.

Sambært uppskotinum skuldi landsstýrismaðurin velja øll 3 umboðini í nevndina. Lógartænastan viðmerkti, at tað var ivasamt, um hetta var í trá við, at Landsbankin er ein myndugleiki óheftur av politiska myndugleikanum. Uppskotið varð síðan broytt, soleiðis at tað nú er ásett, at 5 limir skulu veljast eftir tilmæli frá Fróðskaparsetrinum. Á henda hátt varð eisini tryggja, at nevndarlimirnir hava neyðugan fakligan førleika serliga í mun til, at tað í einum øðrum uppskoti varð skotið upp, at Landsbankanevndin skuldi vera búskaparráð, og landsbankin skuldi røkja skrivarauppgávuna og dagligu umsitingina hjá Búskaparráðnum.

**1.27. Armslongd**
Íleggingargrunnurin fyri Føroyar er ein sjálvstøðugur grunnur. Í eftirkanningini varð spurt, um tað er í tráð við við armslongdarprinsippið, at landsstýrismaðurin skuldi taka avgerð um umsiting, bókhald, grannskoðan og nevndarsamsýning og eisini skuldi luttaka á stýrisfundi, tá ið roknskapurin verður viðgjørdur.

**1.28. Lógaruppskot sum leggja ábyrgd á kommunurnar**
Í einum uppskoti til broyting í tilbúgvingarlógini vórðu kommunurnar millum annað álagdar at bera kostnaðin av vaktsentralinum, uttan at kommunurnar høvdu verið við í tí fyrireikandi arbeiðinum. Lógartænastan viðmerkti, at kommunurnar eru sjálvstøðugar eindir, sum ikki fyrisitingarliga eru undirgivnar landinum. Tá ið tað eru ásetingar í einum lógaruppskoti, sum skerja frælsi hjá kommununum, eiga kommunurnar tíðliga at vera tiknar við í fyrireikingina av lógaruppskotinum, og ikki einans fáa uppskotið sum ummælispartur.

**1.29. Heimild at krevja stuðul sbrt. verklagslóg aftur, eftir at løgtingslógin er farin úr gildi**
Í uppskoti til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn varð ásett, at útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki vera hildnar. Verklagslógin hevði sólsetursáseting um, at løgtingslógin fór úr gildi 31. desember 2027.

Í viðmerkingunum til uppskotið varð tó sagt, at útgoldin stuðul ikki kundi verða kravdur afturgoldin, eftir at løgtingslógin var farin úr gildi. Lógartænastan viðmerkti, at hendan viðmerking ikki gav nakra meining, tá ið tað í serligu viðmerkingunum var upplýst, at avtalan millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu er galdandi til og við 31. desember 2045 fyri at tryggja, at treytirnar framhaldandi eru galdandi, eftir at løgtingslógin er farin úr gildi. Tað, at løgtingslógin fer úr gildi, eigur tí ikki hava ávirkan á, um Fíggjarmálaráðið kann krevja stuðul afturgoldnan, um treytirnar ikki vera hildnar eisini eftir 31. desember 2027.

**1.30. Vanligar málsviðgerðarreglur, innlitsreglur og reglur um persóndáta**
Tað kemur javnan fyri, at tað í lógaruppskoti verða ásettar serligir málsviðgerðarreglur, ella at skotið verður upp at skerja innlitsreglurnar sambært innlitslógini. Lógartænastan ger vart við, at reglurnar sambært fyrisitingarlóg, innlitslóg og dátuverndarlóg eiga at vera nøktandi í nærum øllum førum. Um tað í einstøkum føri ikki er so, má stjórnarráðið grundgeva fyri, hví tað er neyðugt at víkja frá vanligu reglunum og vísa á, hví vanligu reglurnar ikki eru nøktandi.

**1.31. At senda til ummælis**
Tað er ógvuliga týdningarmikið, at øll uppskot verða send til ummælis. Hetta so at borgarar, vinnulív, almennir myndugleikar, stovnar o.o. fáa høvi at gera viðmerkingar og siga sína hugsan um uppskotið. Eisini er tað vanliga so, at tey, sum kenna økið best, sum lóggivið verður um, eru teir borgarar, vinnulív o.o., sum lóggávan hevur til endamáls at ávirka.

Tað hevur eisini verið spurt, um tað er neyðugt at senda uppskot til ummælis, tá ongin ivi er um, at broytingin skal fremjast. Lógartænanstan vísti á, at tað er ongantíð verri fyri eitt uppskot, at tað verður sent til ummælis, hóast ongin ivi er um, at broytingin skal fremjast. Tað kann vera við til at upplýsa lógaruppskotið betri og eisini avleiðingarnar av tí.

**1.32. Ásetingar um eftirkanning av ríkislóggávu**
Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 7.7. Ríkislógartilmæli: Formligu krøvini til ríkislógartilmæli eru sambært § 45 í tingskipanini tey somu sum til løgtingslógaruppskot sambært § 37, og sum ásett í rundskrivi um lógarsmíð. Eftirkanningin fer í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, sum tá talan er um løgtingslógaruppskot, tó at hon ikki kann sigast at vera tann sama. Hetta er grundað á, at ríkislógartilmæli grundleggjandi víkja frá løgtingslógaruppskotum, tí talan er um lógartekst, sum longu er galdandi í Danmark, og at uppskotini í flestu førum verða gjørd av ríkismyndugleikunum.
>
> 7.8. Bekendtgørelser, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse: Sambært stýrisskipanarlógini § 48 er tað avvarðandi landsstýrismaður, sum ummælir uppskot til kunngerðir, sum ráðharri sendir landsstýrinum við atliti at seta í gildi fyri Føroyar. Eftirkanningin av hesum fer í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, sum tá talan er um uppskot til kunngerðir, tó at hon ikki kann sigast at vera tann sama, tí talan er ofta um kunngerðir, sum longu eru galdandi í Danmark, og at uppskotini í flestu førum verða gjørd av ríkismyndugleikunum.
>
> 7.9. Við eftirkanningini sambært nr. 7.7. og 7.8. verður serliga hugt eftir, um tað í innganginum verður víst til lóg ella kunngerð, sum er sett í gildi fyri Føroyar, og hvørjar tillagingar eru gjørdar til føroysk viðurskifti.

Ríkislóggáva er t.d. serstakar fólkatingslógir fyri Føroyar og kongligar fyriskipanir umframt danskar kunngerðir. Hesi uppskot skulu eisini sendast lógartænastuni til eftirkanningar. Donsk lógaruppskot og fyriskipanaruppskot senda stjórnarráðini sum oftast til eftirkanningar, tá ið uppskotið er klárt at senda til landsstýrisfund, soleiðis sum ásett er í rundskrivinum um eftirkanning.

Tá ið talan er um størri lógaruppskot, mælir lógartænastan til, at danska lógaruppskotið ella fyriskipanaruppskotið verður sent lógartænastuni til undaneftirkanning, áðrenn tað verður sent til ummælis. Hetta soleiðis at møguligar tøkniligar villur og tilvísingar til føroyska lóggávu kunnu verða rættaðar av ríkismyndugleikunum, áðrenn uppskotið verður sent út til ummælis.

Danskar kunngerðir (bekendtgørelser) skulu eisini sendast til eftirkanning. Hetta tykjast øll stjórnarráðini ikki at geva sær nóg nógv fær um, tí tað kemur meira enn so fyri, at lógartænastan fyrstu ferð sær danskar kunngerðir, tá tær verða sendar til kunngering í Kunngerðarblaðnum.

Vit fara enn einaferð at heita á stjórnarráðini um at minnast til at senda bekendtgørelser, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelser til eftirkanning, tá tey fáa uppskotini til ummælis frá ríkismyndugleikunum.


SERMÁL
Uppskot
lands-stýrið
løgting sam-tykt
løg-maður stað-festa
Kunn-gerða-blaðið
løgtings lóg
JA
MÁL
FELAGS-MÁL
RLT
lands-stýrið
løgting sam-tykt
løg-maður stað-festa
R U B
FT
DK Mini-sterium
Anord-ning
FT-lov
Fólkating

## 2. Tøkniliga eftirkanningin

### 2.1. Ásetingar um tøkniligu eftirkanningina

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 6.1. Tøkniliga eftirkanningin verður gjørd eftir ásetingunum í rundskrivi um lógarsmíð og skal tryggja, at uppskotið uttan trupulleikar ella ivamál kann kunngerast í Kunngerðablaðnum og samanskrivast í logir.fo.
>
> 6.2. Er avvarðandi stjórnarráð og lógartænastan ikki á einum máli um onkra viðmerking, skal stjórnarráðið venda sær til lógartænastuna hesum viðvíkjandi.
>
> 6.3. Uppskot til rundskriv og leiðbeiningar verða einans tøkniliga eftirkannað. Tó so, um okkurt eyðsýnt ivamál er, so verður hetta nevnt.

Lógartænastan eftirkannar uppskot við støði í galdandi rundskrivi um lógarsmíð, sum kom í gildi 1. januar 2018.

Viðvíkjandi tí tøkniliga partinum av eftirkanningini er tað framvegis soleiðis, at onkur av stjórnarráðunum ikki geva sær nóg nógv far um, at tað er tað eftirkannaða uppskotið (skjalið), sum skal sendast til Løgtingið ella til kunngering.

### 2.2. Tá broytt verður í einum eftirkannaðum uppskoti

Tað kemur eisini fyri, at stjórnarráðini broyta uppskotið, eftir at tað hevur verið til eftirkanningar, t.d. strika ella seta nýggjar ásetingar inn. Tá hava vit eisini seinni sæð, at broytingin ikki er sett rætt upp tøkniliga. Vit mæla til, at um broytingar verða gjørdar í uppskotinum aftan á eftirkanningina, at stjórnarráðini senda uppskotið til endureftirkanning. Hesi uppskot kann lógartænastan ofta avgreiða skjótt, um stjórnarráðið upplýsir, hvørjar broytingar tey hava gjørt.

### 2.3. Uppskot sum er burturfallið í tinginum og verður sett fram aftur

Uppskot, sum er burturfallið í Løgtinginum, t.d. tí tingsetan endaði, áðrenn uppskotið var liðugt viðgjørt, og sum landsstýrið aftur ætlar at leggja fyri Løgtingið, skal sendast til eftirkanning eins og onnur uppskot, hóast uppskotið hevur verið eftirkannað í eini fyrru tingsetu. Tað vísir seg oftani, at smærri broytingar eru gjørdar, og at tøkniligar villur søkja seg inn aftur í uppskotið. Hesi uppskot kann lógartænastan ofta avgreiða skjótt, um stjórnarráðið upplýsir, hvørjar broytingar tey hava gjørt.

### 2.4. Skabelónir

Lógartænastan hevur gjørt 8 skabelónir til: løgtingslóg, løgtingslóg um broyting í løgtingslóg, javntekst, kunngerð, kunngerð um broyting í kunngerð, ríkislógartilmæli, rundskriv og leiðbeiningar.

Nýggjasta útgávan er altíð at finna á breddanum hjá lógartænastuni á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni: http://www.lms.fo/fo/arbeidsoki/logarsmid/word-skabelonir-til-logarsmid/

Øll sum gera uppskot til løgtingslógir, kunngerðir, rundskriv og leiðbeiningar o.a. eiga at brúka skabelónirnar, tí hetta ger, at uppskotini verða tøkniliga rætt sett upp.

# 3. Yvirlit yvir eftirkanningar

## 3.1. Uppskot, ið skulu eftirkannast av lógartænastuni

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

2.1. Lógartænastan á Løgmansskrivstovuni eftirkannar øll lógaruppskot, uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Frávik frá hesum kann einans gerast í samráð við løgmann.

2.2. Lógartænastan eftirkannar allar kunngerðir, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini allar kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at lýsa kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna.

Í løgtingsárinum 2020 eftirkannaði lógartænastan tilsamans 234 uppskot frá øllum sjey stjórnarráðunum. Hetta er 32 uppskot fleiri enn í 2019.

Nøgdin av uppskotum sigur tó ikki alt, tí uppskotini kunnu vera sera ymisk bæði í longd, torleika og margfeldið. Soleiðis var eisini í hesum tingárinum.

| *Talva 1* | **Eftirkanningar íalt** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** |
| **Løgtingslóg** | **19** | **11** | **14** | **23** | **29** | **26** | **21** |
| **Kunngerð** | **69** | **74** | **97** | **88** | **93** | **76** | **97** |
| **Broytingarlóg** | **75** | **64** | **50** | **46** | **72** | **48** | **56** |
| **Broytingarkunngerð** | **35** | **36** | **50** | **65** | **54** | **39** | **47** |
| **Ríkislógartilmæli** | **27** | **3** | **11** | **12** | **6** | **6** | **8** |
| **Uppsk. til samtyktar** | **3** | **1** | **-** | **1** | **2** | **3** | **1** |
| **Stovnar** | | | | **5** | **1** | **-** | **1** |
| **Rundskriv** | | | | **6** | **8** | **2** | **1** |
| **Leiðbeining** | | | | **2** | **-** | **2** | **2** |
| **Kirkjulig fyriskipan** | | | | | | **1** | |
| **Íalt** | **228** | **189** | **222** | **248** | **265** | **202** | **234** |

### 3.2. Yvirlit yvir uppskotini

Niðanfyri er yvirlit yvir uppskotini frá teimum einstøku stjórnarráðunum. Tølini eru fyri løgtingsárini 2014 - 2020.

| *Talva 2* | Løgmansskrivstovan | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2014* | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
| Løgtingslóg | - | - | 1 | - | - | - | 1 |
| Kunngerð | - | 3 | 12 | - | 2 | - | 1 |
| Broytingarlóg | 2 | - | 4 | 1 | 5 | 2 | 1 |
| Broytingarkunngerð | - | - | 3 | - | - | - | - |
| Ríkislógartilmæli | - | 1 | 3 | - | 1 | 3 | 1 |
| Uppsk. til samtyktar | 3 | - | - | - | - | - | - |
| Rundskriv | - | - | - | - | 1 | - | - |
| Kirkjulig fyriskipan | - | - | - | - | - | 1 | - |
| Íalt | 5 | 4 | 23 | 1 | 9 | 6 | 4 |

*Uttanríkistænastan partur av LMS

| *Talva 3* | Fíggjarmálaráðið | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
| Løgtingslóg | 5 | 3 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 |
| Kunngerð | 8 | 10 | 3 | 7 | - | 12 | 13 |
| Broytingarlóg | 16 | 24 | 10 | 14 | 21 | 17 | 20 |
| Broytingarkunngerð | 1 | 1 | 8 | 5 | 2 | 5 | 10 |
| Ríkislógartilmæli | 19 | - | 3 | 11 | 3 | - | - |
| Uppsk. til samtyktar | - | - | - | - | - | - | - |
| Rundskriv | | | | 6 | 4 | 2 | 1 |
| Leiðbeining | | | | 1 | - | - | - |
| Íalt | 49 | 38 | 26 | 47 | 34 | 41 | 50 |

| *Talva 4* | Umhvørvis- og vinnumálaráðið | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2014* | 2015** | 2016** | 2017** | 2018** | 2019 | 2020 |
| Løgtingslóg | 2 | 1 | 4 | 7 | 3 | 10 | 7 |
| Kunngerð | 11 | 9 | 17 | 26 | 12 | 21 | 13 |
| Broytingarlóg | 19 | 6 | 7 | 5 | 7 | 9 | 11 |
| Broytingarkunngerð | 6 | 3 | 6 | 7 | 6 | 9 | 3 |
| Ríkislógartilmæli | 6 | 1 | 1 | - | 1 | 2 | 2 |
| Uppsk. til samtyktar | - | 1 | - | 1 | 2 | - | - |
| Rundskriv | | | | - | 2 | - | |
| Leiðbeining | | | | - | - | - | 1 |
| Stovnar*** | | | | 5 | 1 | - | 1 |
| Íalt | 44 | 21 | 35 | 51 | 34 | 51 | 38 |

* Vinnumálaráðið **Uttanríkis- og vinnumálaráðið ***Sjóvinnustýrið og Fjarskiftiseftirlitið

| *Talva 5* | Fiskimálaráðið | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** |
| **Løgtingslóg** | 4 | 2 | 3 | 4 | 1 | 1 | - |
| **Kunngerð** | 29 | 28 | 29 | 33 | 31 | 34 | 30 |
| **Broytingarlóg** | 6 | 8 | 4 | 3 | 6 | 3 | 5 |
| **Broytingarkunngerð** | 14 | 12 | 18 | 21 | 24 | 11 | 15 |
| **Ríkislógartilmæli** | - | - | 1 | - | - | - | - |
| **Uppsk. til samtyktar** | - | - | - | - | - | - | 1 |
| **Leiðbeining** | | | | 1 | - | 1 | - |
| **Íalt** | **53** | **50** | **55** | **62** | **62** | **50** | **51** |

| *Talva 6* | Uttanríkis- og mentamálaráðið | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2014*** | **2015*** | **2016*** | **2017*** | **2018*** | **2019** | **2020** |
| **Løgtingslóg** | 6 | 1 | 2 | 1 | 5 | 4 | 4 |
| **Kunngerð** | 7 | 9 | 4 | 6 | 22 | 5 | 15 |
| **Broytingarlóg** | 10 | 9 | 6 | 7 | 4 | 2 | 2 |
| **Broytingarkunngerð** | 3 | 8 | 3 | 6 | 10 | 3 | 5 |
| **Ríkislógartilmæli** | - | -- | - | - | - | - | - |
| **Uppsk. til samtyktar** | - | - | - | - | - | 3 | - |
| **Rundskriv** | | | | - | 1 | - | - |
| **Íalt** | **26** | **27** | **15** | **20** | **42** | **17** | **26** |

* Mentamálaráðið

| *Talva 7* | Almannamálaráðið | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** |
| **Løgtingslóg** | - | 2 | 1 | 5 | 4 | 4 | 2 |
| **Kunngerð** | 1 | 4 | 14 | 1 | 4 | 1 | 16 |
| **Broytingarlóg** | 15 | 8 | 9 | 9 | 16 | 12 | 15 |
| **Broytingarkunngerð** | 2 | 4 | 2 | 1 | 5 | 5 | 9 |
| **Ríkislógartilmæli** | - | - | - | - | - | - | 1 |
| **Uppsk. til samtyktar** | - | - | - | - | - | - | - |
| **Leiðbeining** | - | - | - | - | - | 1 | 1 |
| **Íalt** | **18** | **18** | **26** | **16** | **29** | **23** | **44** |

| *Talva 8* | Heilsumálaráðið | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2014** | **2015*** | **2016*** | **2017*** | **2018*** | **2019** | **2020** |
| **Løgtingslóg** | **2** | **1** | **1** | **2** | **5** | **2** | **1** |
| **Kunngerð** | **9** | **9** | **10** | **10** | **18** | **3** | **9** |
| **Broytingarlóg** | **7** | **6** | **7** | **5** | **7** | **3** | **2** |
| **Broytingarkunngerð** | **9** | **7** | **6** | **18** | **3** | **6** | **5** |
| **Ríkislógartilmæli** | **2** | **1** | **3** | **1** | **1** | **1** | **4** |
| **Uppsk. til samtyktar** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| **Íalt** | **29** | **24** | **27** | **36** | **34** | **15** | **21** |

* Heilsu- og innlendismálaráðið

### 3.3. Hvat siga tølini?

*Mynd 1*




Verður hugt eftir býtinum av teimum 234 uppskotunum millum løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógartilmæli og uppskotum til samtyktar í tingárinum 2020 í mun til í 2019 sæst, at tað eru nakað fleiri broytingarlógir, broytingarkunngerðir, ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar útgivin í tingárinum 2020 í mun til í 2019. Løgtingslógum – høvuðslógum – vóru eitt sindur færri av.

Flestu uppskotini høvdu Fiskimálaráðið og Fíggjarmálaráðið, síðani kemur Almannamálaráðið og Umhvørvis- og vinnumálaráðið, meðan hini uppskotini eru býtt millum hini stjórnarráðini. Løgmansskrivstovan hevði fæst uppskot.

Av teimum 232 uppskotunum vóru 21 *nýggjar løgtingslógir* í mun til 26 í 2018. Ein nýggj løgtingslóg merkir, at tað verður lóggivið um nakað, sum tað ikki fyrr er lóggivið um, ella at lóggávan á økinum verður endurnýggja og umskipað soleiðis, at tað ikki er nøktandi at gera broytingar í eini galdandi løgtingslóg. Av teimum 21 lógaruppskotunum átti Umhvørvis- og vinnumálaráðið 7, Fíggjarmálaráðið 6, Uttanríkis- og mentamálaráðið 4, Almannamálaráðið 2, Heilsumálaráðið og Løgmansskrivstovan 1 hvør av uppskotunum. Fiskimálaráðið hevði onki.

Tað vóru 56 uppskot um at gera *broytingar í galdandi løgtingslógum*. Hetta er eitt sindur fleiri enn í 2019, tá tað vóru 48 uppskot til broytingarlógir. Av hesum átti Fíggjarmálaráðið 20, Almannamálaráðið 15, Umhvørvis- og vinnumálaráðið 11, Fiskimálaráðið 5, Uttanríkis- og mentamálaráðið og Heilsumálaráðið 2 hvør, meðan Løgmansskrivstovan átti 1.

Tølini vísa eisini, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið, Almannamálaráðið, Uttanríkis- og mentamálaráðið og Heilsumálaráðið høvdu væl fleiri uppskot, Fiskimálaráðið nakað tað sama, meðan Fíggjarmálaráðið og Løgmansskrivstovan høvdu færri uppskot í tingárinum 2020 enn í 2019. Verður hugt nærri at hesum tølum sæst, at tað serliga er tal av kunngerðum, sum er grundin til, at stjórnarráðini antin høvdu fleiri uppskot ella færri uppskot í 2020 enn í 2019.

Av samlaðu eftirkannaðu uppskotunum átti Umhvørvis- og vinnumálaráðið 38, Fiskimálaráðið 51, Fíggjarmálaráðið 50, Almannamálaráðið 44, Uttanríkis- og mentamálaráðið 26, Heilsumálaráðið 21, og Løgmansskrivstovan 4.

*Mynd 2*



Tað sæst týðuliga, at tað serliga eru kunngerðirnar, sum tað eru flest av í eftirkanningini. Av teimum 234 uppskotunum vóru 144 kunngerðir, av hesum 97 nýggjar kunngerðir og 47 broytingarkunngerðir. Tvs. at 62% av eftirkanningunum í tingárinum 2020 vóru kunngerðir.

Afturímóti vóru 77 lógaruppskot, av hesum 21 nýggjar lógir og 56 broytingarlógir; hetta svarar til 33% av eftirkannaðu uppskotunum. Ríkislógartilmælini vóru 8 í tali svarandi til 3%. Seinastu 2% eru uppskot til samtyktar, rundskriv og leiðbeiningar.

### 3.4. Longd á eftirkanning

Rundskrivið um eftirkanning ásetir:

> 3.2. Lógartænastan skal hava í minsta lagi 5 yrkadagar til eftirkanning. Í serligum førum, tá arbeiðsbyrðan hjá lógartænastuni kann væntast at vera stór, t.d. undan seinasta framløgudegi, kann roknast við, at eftirkanning tekur longri enn 5 yrkadagar. Hetta eigur landsfyrisitingin at hava í huga.

Í løgtingsárinum 2020 blivu 93% av uppskotunum eftirkannað innan 5 dagar, ið er minst ásetta tíðin, sum lógartænastan skal hava til at eftirkanna uppskot. Hetta er ein framgongd á uml. 1% í mun til løgtingsárið 2019, og er tað besta úrslitið fyri øll 7 árini, har eftirkanningar eru skrásettar.

99% av uppskotunum í 2020 vóru eftirkannað innan 8 yrkadagar. Hetta er ein framgongd upp á 3% í mun til 2019. Einans 1% av uppskotunum vóru eftirkannað millum 9 dagar ella longri.

| *Talva 11* | **Longd á eftirkanning** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **1-5 dagar** | | **6-8 dagar** | | **9 dagar ella longri** | | **Íalt** |
| | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | **Tal** | **%** | |
| **2014** | 178 | 77,7 | 32 | 14,0 | 19 | 8,3 | **229** |
| **2015** | 171 | 89,5 | 5 | 2,6 | 15 | 7,9 | **191** |
| **2016** | 170 | 76,6 | 20 | 9,0 | 32 | 14,4 | **222** |
| **2017** | 206 | 83% | 22 | 9% | 20 | 8% | **248** |
| **2018** | 234 | 89% | 20 | 7% | 11 | 4% | **265** |
| **2019** | 185 | 92% | 9 | 4% | 8 | 4% | **202** |
| **2020** | 220 | 93% | 15 | 6% | 1 | 1% | **234** |

*Mynd 3*



Longd á eftirkanning 2014-2020
250
200
150
100
50
0
1-5 dagar
6-8 dagar
9 dagar ella longri
2014
2015
2016
2017
2018
2019
2020

## 4. Eftirkannað uppskot og viðgerðin í Løgtinginum

Tað sæst á tølunum, at tað vóru eftirkannað 86 uppskot hjá øllum stjórnarráðunum tilsamans. Av hesum vóru 21 høvuðslógir, 56 broytingarlógir og 8 ríkislógartilmæli. Eisini var eitt uppskot til samtyktar eftirkannað.

Landsstýrið legði 85 uppskot fyri Løgtingið. Av hesum vóru 71 lógaruppskot, 8 ríkislógartilmæli og trý uppskot til samtyktar. Løgtingið samtykti 82 av uppskotunum, meðan 3 uppskot fullu burtur.

At tað ikki er samsvar millum tal av eftirkannaðum uppskotum og tal av framløgdum uppskotum í tinginum kann koma av, at eitt eftirkannað uppskot ikki er lagt fyri Løgtingið. Tað kemur tó eisini fyri, at sama uppskot verður broytt aftan á eftirkanningina, verður sent til eftirkanningar umaftur, og at uppskotið tískil er eftirkannað meira enn eina ferð. Heldur ikki kann útihýsast, at okkurt uppskot, sum er eftirkannað, ikki er skrásett í yvirlitinum hjá lógartænastuni.

Tað sæst, at av uppskotunum hjá landsstýrinum vóru 83,5% løgtingslógaruppskot, 9,5% ríkislógar-tilmæli, t.e. felagslóggáva, 3,5% uppskot til samtyktar, og at 3,5% av uppskotunum fullu burtur.

*Mynd 4*




### 4.1. Løgmansskrivstovan

Hjá Løgmansskrivstovuni vóru 3 lógaruppskot eftirkannað. Av hesum var 1 løgtingslógaruppskot, 1 broytingaruppskot og 1 ríkislógartilmæli. Øll 3 uppskotini vóru løgd fyri Løgtingið, sum samtykti øll uppskotini.

### 4.2. Fíggjarmálaráðið

Tað vóru eftirkannað 26 lógaruppskot hjá Fíggjarmálaráðnum. Av hesum vóru 6 høvuðslógir og 20 broytingarlógir. Landsstýrismaðurin legði 23 uppskot fyri Løgtingið. Av framløgdu uppskotunum vóru øll uppskotini samtykt.

**4.3. Umhvørvis- og vinnumálaráðið**

Tað vóru eftirkannað 20 lógaruppskot hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Av hesum vóru 7 høvuðslógir, 11 broytingarlógir og 2 ríkislógartilmæli. Landsstýrismaðurin legði 22 uppskot fyri Løgtingið. Løgtingið samtykti 19 av uppskotunum, meðan 1 uppskot fall burtur.

**4.4. Fiskimálaráðið**

Tað vóru eftirkannað 5 uppskot hjá Fiskimálaráðnum. Landsstýrismaðurin legði 7 uppskot fyri Løgtingið. Løgtingið samtykti 6 av uppskotunum, meðan 1 uppskot fall burtur.

**4.5. Uttanríkis- og mentamálaráðið**

Tað vóru eftirkannað 7 uppskot hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Av hesum vóru 4 høvuðslógir og 2 broytingarlógir. Landsstýrismaðurin legði 8 uppskot fyri Løgtingið. Løgtingið samtykti øll uppskotini.

**4.6. Almannamálaráðið**

Tað vóru eftirkannað 18 lógaruppskot hjá Almannamálaráðnum. Av hesum vóru 2 høvuðslógir, 15 broytingarlógir og 1 ríkislógartilmæli. Landsstýrismaðurin legði 14 uppskot fyri Løgtingið, sum samtykti 13 uppskot, meðan eitt uppskot fall burtur.

**4.7. Heilsumálaráðið**

Tað vóru eftirkannað 7 lógaruppskot hjá Heilsumálaráðnum. Av hesum var 1 høvuðslóg, 2 broytingarlógir og 4 ríkislógartilmæli. Landsstýrismaðurin legði 7 uppskot fyri Løgtingið. Løgtingið samtykti øll uppskotini.

*Mynd 5*



# 5. Ummælisportalurin

Uppskot eiga altíð at verða send til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, og vanliga eigur tíðarfreistin at lata inn ummæli at vera 4 vikur. Henda freist eigur ikki at verða skerd uttan so, at tað er átrokandi neyðugt.

Eftir áheitan frá MEGD verður mælt til, at stjórnarráðini í størst møguligan mun eisini senda uppskot til ummælis hjá MEGD.

Uppskot til verklagslógir eiga altíð at verða send til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum.

*Umframt* at stjórnarráðini senda uppskot til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, skulu øll uppskot hjá stjórnarráðunum eisini leggjast á ummælisportalin á heimasíðuni hjá landsstýrinum, sum øll hava atgongd til.

Ummælisportalurin sæst her: http://www.foroyalandsstyri.fo/fo/kunning/uppskot-til-ummaelis/

Á heimasíðuni hjá stjórnarráðunum ber eisini til einans at síggja tey uppskot, sum viðkomandi ráðið hevur til ummælis.

Okkara royndir eru, at stjórnarráðini nú eru meira tilvitað um at leggja fyrireikingararbeiðið við lógaruppskotum soleiðis til rættis, at tað í tíðarætlanini eisini verður sett tíð til, at uppskot kunnu verða send til ummælis sum høvuðsregla í 4 vikur.

Enn er tað tó soleiðis, at orsakað av tíðarneyð verður ummælistíðin ofta skerd, heilt niður í nakrar dagar, og í hesum førunum verða uppskotini ofta heldur ikki løgd á almenna ummælisportalin. Hetta hevur við sær, at dygdin á lógaruppskotinum ikki gerst so góð, sum hon kundi verið.

## 5.1. Einans uppskot sum eru løgd á ummælisportalin

Grundarlagið fyri hesum partinum av ársfrágreiðingini er ein uppteljing av teimum uppskotum, sum hava verið løgd út alment til ummælis á ummælisportalinum á heimasíðuni hjá landsstýrinum. Tað merkir, at uppskot, sum als ikki hava verið send til ummælis, ella sum einans hava verið send beinleiðis til ummælis hjá viðkomandi uttanhýsis pørtum, ikki eru við í hesi uppteljing. Yvirlitið vísir sostatt einans ummælisfreistir fyri tey uppskot, sum hava verið á ummælisportalinum.

### 5.2. Ummælisfreistir

Á ummælisportalinum sæst, at í tingárinum 2020 løgdu stjórnarráðini tilsamans 98 uppskot alment til ummælis á ummælisportalinum. Av hesum vóru 30 løgtingslógaruppskot, 62 kunngerðir og 6 ríkislógartilmæli.

| *Talva 12* | Ummælisfreistir | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2017 | | 2018 | | 2019 | | 2020 | |
| | Nøgd | % | Nøgd | % | Nøgd | % | Nøgd | % |
| **1 - 14 dagar** | 22 | 29% | 34 | 33% | 17 | 29% | 30 | 30% |
| **15 - 27 dagar** | 38 | 49% | 33 | 33% | 27 | 46% | 35 | 36% |
| **28 dagar ella longri** | 17 | 22% | 35 | 34% | 15 | 25% | 33 | 34% |
| **Íalt** | **77** | **100%** | **102** | **100%** | **59** | **100%** | **98** | **100%** |

Sum høvuðsregla eiga uppskot at verða send til ummælis í 4 vikur ella 28 dagar. Tað sæst á talvuni omanfyri, at fyri 66% av uppskotunum var ummælisfreistin í løgtingsárinum 2020 sett millum 1-27 dagar, og fyri 34% av uppskotunum var ummælisfreistin 28 dagar ella meira. Tað merkir, at tað er ein triðingur av øllum uppskotunum, sum hava havt tilmæltu ummælistíðina upp á 4 vikur. Hetta er ein framgongd í mun til tingárið 2019, tá ein fjórðingur av uppskotunum høvdu tilmæltu ummælistíðina. Hetta er ein bati, men tó ikki nøktandi.

Ein ummælisfreist, sum er minni enn 14 dagar, verður als ikki mett at vera nøktandi. Ein ummælisfreist upp á í minsta lagi 15 dagar má roknast sum eitt *minstamark* fyri eini rímiligari ummælisfreist. Á talvuni omanfyri sæst, at fyri 30% av uppskotunum var ummælisfreistin sett millum 1-14 dagar, og fyri 70% av uppskotunum var ummælisfreistin meira enn 15 dagar.

Tað merkir, at knappur triðingur av øllum uppskotunum ikki hava havt eina nøktandi ummælisfreist. Tað eru alt ov nógv uppskot eftir okkara tykki.

*Mynd 6*



Myndin vísir, at tað eru færri uppskot í 2019, sum hava verið til ummælis longri enn 28 dagar, enn í 2018. Tó sæst at tað eru fleiri uppskot í 2019, sum hava verið til ummælis í minst 15 dagar, og eitt sindur færri uppskot, sum hava verið til ummælis í minni enn 14 dagar.

### 5.3. Samanumtøka um ummælisfreistir

Øll stjórnarráðini uttan Løgmansskrivstovan hava sent uppskot til ummælis við styttri freist enn 14 dagar. Tilsamans vóru 30% av uppskotunum hjá øllum stjórnarráðunum undir einum send til ummælis við styttri enn 14 daga freist, og sum nevnt frammanfyri er *ein ummælisfreist, sum er minni enn 14 dagar, ikki nøktandi*.

Fyri Fiskimálaráðið og Fíggjarmálaráðið var talan um 50% av teirra uppskotum, fyri Umhvørvis- og vinnumálaráðið 42%, Heilsumálaráðið 29%, meðan talan var um 17% av uppskotunum hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum, og síðani 6% av uppskotunum hjá Almannamálaráðnum.

Tað er hinvegin jaligt, at 70% av uppskotunum hóast alt hava verið send til ummælis við meira enn 15 daga freist, sum má metast at vera eitt *minstamark* fyri eini rímiligari ummælisfreist.

Tá talan er um at senda uppskot til ummælis við *tilmæltu ummælisfreistini uppá 4 vikur*, var fyri Løgmansskrivstovuna talan um 83% av teirra uppskotum, fyri Heilsumálaráðið 71%, Uttanríkis- og mentamálaráðið 44%, Fíggjarmálaráðnum 40%, Almannamálaráðið 35%, og síðani 29% av uppskotunum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, meðan hjá Fiskimálaráðnum vóru einans 4% av teirra uppskotum sent til ummælis við minst 4 vikurs ummælisfreist. Fiskimálaráðið er í eini serligari støðu, tí ein stórur partur av teirra kunngerðum er um at skipa fiskiskapin. Hesar kunngerðir hava ofta skund, og tað ber tí ikki til at hava ummælisfreist uppá 4 vikur. Hesar kunngerðir verða altíð lagdar fyri Fiskivinnuráðið til ummælis, og á tann hátt verða viðkomandi partar hoyrdir. Tó sæst at Fiskimálaráðið í størri mun enn fyrr hevur eina ummælisfreist uppá 15 dagar fyri fleiri av hesum kunngerðunum og soleiðis halda seg til minstamarkið fyri ummælisfreist.

### 5.4. Ov nógv uppskot verða ikki løgd á ummælisportalin

Á ummælisportalinum sæst, at í tingárinum 2020 løgdu stjórnarráðini tilsamans 98 uppskot alment til ummælis á ummælisportalinum. Í mun til hetta eftirkannaði lógartænastan 234 uppskot. Eftir hesum vóru einans umleið 42% av eftirkannaðu uppskotunum løgd út til almenna hoyring á ummælisportalinum.

Tað ber ikki til beinleiðis at samanlíkna hesi tølini, tí uppskot kunnu verða send til ummælis í eini tingsetu, men tey verða ikki eftirkannað og løgd fyri Løgtingið fyrrenn í næstu tingsetu.

Hóast hesa óvissu tykist tað at vera ein rættiliga stórur munur á eftirkannaðum uppskotum og uppskotum løgd á ummælisportalin, tá munurin er 136 uppskot. Hetta merkir at 58% av uppskotunum ikki vóru løgd á ummælisportalin. Til samanberingar kann verða víst á, at í tingárinum 2019 vóru 70% av uppskotunum ikki løgd á ummælisportalin, so her er hóast alt ein framgongd at síggja.

Ein orsøk til hetta kann vera, at lóggávan viðvíkjandi covid-19 ikki altíð sær út til at hava verið send alment til ummælis.

Vit fara at heita á stjórnarráðini um at minnast til, at øll uppskot hjá stjórnarráðunum eisini skulu leggjast á ummælisportalin, umframt at stjórnarráðini senda uppskot beinleiðis til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum.

## 6. Kunngerðarblaðið

Í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um alment kunngerðablað, sum broytt við løgtingslóg nr. 131 frá 14. desember 2012, verður álagt landsstýrinum at stíla fyri útgávu av einum almennum kunngerðablaði: Kunngerðablaðið.

Í Kunngerðablaðnum skulu allar løgtingslógir, kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur, ið landsstýrið gevur út, kunngerast.

Frá 1. januar 2013 verður Kunngerðablaðið einans givið út talgilt og ikki í pappírsútgávu sum áður. Kunngerðaportalurin gerst við hesum einasti bindandi kunngerðamiðilin til løgtingslógir, kunngerðir o.a.

Í Kunngerðablaðið A verða løgtingslógir og kunngerðir, givnar av landsstýrinum, kunngjørdar, og í Kunngerðablaðið B verða lógir og kunngerðir, ið ríkismyndugleikarnir geva út, kunngjørdar.

Tað er lógartænastan, sum hevur ábyrgd fyri at geva út Kunngerðablaðið. Kunngerðablaðið verður vanliga givið út fríggjadagar.

### 6.1. Kunngering í tingárinum 2020

Í tingárinum 2020 vóru tilsamans 286 løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógir og bekendtgørelser o.a. kunngjørd í Kunngerðarblaðnum. Av hesum vóru 223 føroyskar rættarreglur og 63 ríkislóggáva. Tvs. at 78% av kunngjørdu rættarreglunum í tingárinum 2020 eru føroyskar, meðan 22% er donsk ríkis-lóggáva.

| *Talva 21* | **Kunngerðir** | **Løgtingslógir** | **Lov og fyriskipan (Anordning)** | **Bekendtgørelse** | **Fíggjarlóg o.a.** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Almannamálaráðið** | 25 | 14 | - | - | - |
| **Fiskimálaráðið** | 43 | 6 | - | - | - |
| **Fíggjarmálaráðið** | 20 | 20 | - | - | 5 |
| **Heilsumálaráðið** | 13 | 3 | 4 | 2 | - |
| **Løgmansskrivstovan** | 4 | 4 | 4 | 36 | - |
| **Uttanríkis- og mentamálaráðið** | 19 | 7 | - | - | - |
| **Umhvørvis- og vinnumálaráðið** | 21 | 19 | 3 | 14 | - |
| **Ialt** | **145** | **73** | **11** | **52** | **5** |

*Mynd 7*


286 rættarreglur kunngjørdar í tingárinum 2020
5; 2%
52; 18%
11; 4%
145; 51%
73; 25%
Kunngerðir
Løgtingslógir
Lov og fyriskipan
Bekendtgørelse
Fíggjarlóg o.a.

*Mynd 8*


Kunngjørdar rættarreglur tingárini 2018, 2019 og 2020
160
140
120
100
80
60
40
20
0
Løgtingslóg
Kunngerð
Lov og fyriskipan
Bekendtgørelse
2018
2019
2020